ítróttur

Nr. 213 • leygardagur • 8. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Tunnligt vikuskifti

Bert tríggir dystir verða leiktir í teimum báðum fremstu hondbóltsdeildunum um vikuskiftið

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

VB er uttan iva favorittur, tá StÍF vitjar um vikuskiftið, men gestirnir munnu tó ikki hava nakrar ætlanir um at fara heim við ongum

Í mun til so nógv onnur vikuskifti, so verður nakað tunnligt við hondbóltinum hesaferð. Bert tríggir dystir standa á skránni hesaferð, og eru tveir teirra í kvinnudeildini, meðan tann seinasti verður hjá monnunum.

Hjá kvinnunum hava bæði VB og Stjørnan heimavøll, og í so máta er skjótt at staðfesta, at tey eru at rokna sum favorittar í sínum dystum. Einamest Stjørnan, sum sunnudagin tekur ímóti Søljuni. Alt annað enn ein tryggur sigur til heimaliðið má her metast sum ein risa-sensatión. Ikki minst eftir at Stjørnan seinasta vikuskifti staðfesti sína tilveru í oddinum, tá tær vunnu trygt á annars ósigraða VB.

VB má eisini roknast sum favorittur, tá tær á heimavølli taka ímóti StÍF. Her verður mótstøðan tó helst nakað harðari, enn hon verður hjá Stjørnuni, tí hóast alt, so er talan um bronsuvinnararnar frá seinasta kappingarári, sum vitja. Eitt heiti, sum StÍF heldur ikki tykist vilja sleppa soleiðis uttan víðari, og megna tær at fáa stig leygardagin, so hanga tær framvegis væl við í oddinum. Og so skal heldur ikki gloymast, at VB framvegis er nakað skert. Roknast kann við, at Gurið Mortensen fer at royna at spæla leygardagin, men hinvegin er meira ivasamt, hvørt Daiva Toumaite enn er før fyri at lofta og kasta einum hondbólti.

Treiskir hoyvíkingar

Hjá monnunum verður bert ein dystur hetta vikuskiftið. Hesin verður í Hoyvíkarhøllini, har stigaleysa H71 tekur ímóti StÍF. Uttan iva ein dystur, sum strandingar skulu vinna, um teir skulu halda fast í oddinum, men hinvegin hevur árið vístur, at eingin kann kenna seg tryggan í deildini. Og hóast teir enn eru stigaleysir, so hava hoyvíkingarnir fleiri ferðir sýnt, at teir kunnu vera treiskir. Eisini hóast mótstøðan á pappírinum tykist í sterkara lagi.

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF	6	5	-	0	-	1	154	127	27	10
2 VB	5	4	-	0	-	1	126	89	37	8
3 Stjørnan	4	2	-	1	-	1	97	78	19	5
4 StÍF	4	2	-	1	-	1	96	94	2	5
5 Neistin	4	2	-	0	-	2	111	88	23	4
6 Søljan	4	0	-	0	-	4	69	104	-35	0
7 Kyndil	5	0	-	0	-	5	68	141	-73	0

1. Deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Kyndil	4	3	-	1	-	0	116	109	7	7
2 Neistin	3	2	-	1	-	0	88	76	12	5
3 StÍF	3	2	-	0	-	1	73	67	6	4
4 VÍF	4	1	-	0	-	3	101	100	1	2
5 KÍF	3	1	-	0	-	2	75	81	-6	2
6 H71	3	0	-	0	-	3	72	92	-20	0

Dystir um vikuskiftið

Hondbóltur

1. deild kvinnur

08.11	14.30	VB-StÍF
09.11	15.00	Stjørnan-Søljan

1. deild menn

09.11	16.00	H71-StÍF

Flogbóltur

Meistaradeild kvinnur

08.11	14.00	Mjølnir-KÍF
09.11	14.00	Dráttur-ÍF
09.11	15.00	TB-Fleyr

Meistaradeild menn

08.11	16.00	Mjølnir-Fram
09.11	16.00	SÍ-ÍF

Oddaliðið í Klaksvík

Eftir framúr byrjanina upp á árið fær KÍF trupla uppgávu móti Mjølni, sum ikki hevur ráð at missa nakað. Og hjá monnunum verður stóri dysturin í Sørvági

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo



Skal Mjølnir halda fast um vanligu støðuna sum eitt av fremstu liðunum, so er neyðugt við tveimum stigum, tá KÍF vitjar leygardagin

Tríggir dystir verða leiktir í bestu kvinnudeildini í flogbólti um vikuskiftið.Størsti spenningurin kring hesar er helst í Klaksvík, har KÍF kemur á vitjan. Hevði stigatalvan sæð út soleiðis, sum hon plagar at gera, so var einki at ivast í, at her lógu tvey trygg stig og bíðaðu eftir Mjølnir, men tað gera tað á ongan hátt hesaferð.

Mjølnir hevur í ár fingið eina byrjan, har liðið ikki er at finna í oddinum, og einamest hevur KÍF veruliga gjørt um seg í ár. Liðið er styrkt við útlendskum leikarum, og saman við teimum heimligu hava hesar syrgt fyri, at fyrstu fýra dystirnir hava kastað átta stig av sær. So er spurningurin, hvørt talan verður um tvey stig afturat leygardagin, ella um Mjølnir nú fer at gera um seg.

Sunnudagin verða so tveir dystir leiktir. Í Trongisvági er eingin ivi um, at TB man vera liðið, sum er best fyri, tá tær taka ímóti Fleyr. TB hevur framvegis eitt av sterkastu liðunum í landinum, og einki er at ivast í, at tær aftur í ár fara at stríðast heilt frammi í oddinum. Fleyr hevur hinvegin enn ikki fingið eitt lið, sum stendur mát við glæsuligu úrslitini í søgubókunum, og tí skal ikki roknast við, at tær gera tað heilt stóra um seg hesaferð.

Seinasti dysturin verður á Giljanesi, har Dráttur tekur ímóti meistarunum úr ÍF. Enn hevur ÍF so ikki sýnt nakað meistaraspæl í ár, men partvíst man tað eisini koma av skaðunum, sum hava rakt liðið. Enn eru tær tó ikki heilt afturúrsigldar, og megna tær at venda gongdini nú, so røkist kanska fyri, at tær hóast alt verða nakað drúgvari, enn stigatalvan í løtuni ber boð um.

Spenningur í Sørvági

Hjá monnunum eru tveir dystir á skránni um vikuskiftið. Stóri spurningurin her man vera, hvussu tað fer at tørna út, tá SÍ og ÍF fara at takast í Sørvági. Saman við Mjølnir eru hetta liðini, sum roknast kann við í oddinum, men hvørki teirra hevur higartil sýnt somikið sannførandi avrik, at ein oddasessur eigur at vera sjálvskrivaður.

Tað hevur Mjølnir hinvegin, og tá Fram kemur á vitjan leygardagin, er einki at ivast í, at klaksvíkingar ætla sær tvey stig afturat. Fram er í løtuni í holt við at byggja sær eitt nýtt lið upp, og tó at talan gjørdist um sigur móti Fleyr, so skal helst meira enn til, um klaksvíkingarnir skulu takast á bóli.

Ungir føroyameistarar av Tvøroyri

Hetta eru piltarnir hjá TB, sum vunnu føroyameistaraskapin á hálvum vølli í ár. Aftara rað frá vinstru standa: Milan Cimburovic, venjari, Michael Jespersen, Jákup Vestergaard, Jarmund Michelsen, Magnar Vang, Hanus Mortensen og Heini Mortensen. Í fremra rað frá vinstru standa Tróndur Tummasarson, Hugin Albinus, Fróði Jensen, Gudfinn Jespersen, Gilli Sørensen og Arthur Poulsen Kjartan Niclasen, sum eisini spældi við, er ikki við á myndini

Seinastu árini hevur tað verið meiri upp og niður, hvussu tað hevur gingist hjá TB í fótbólti.

Men ikki skerst burtur, at hjá teimum yngru gongur betri enn hjá teimum eldru. Soleiðis eydnaðist tað hjá piltunum hjá TB at gerast føroyameistari á hálvum vølli. Tað eru dreingir, sum spæla í aldursbólkinum 10-12 ár.

Og tað gjørdu teir ógvuliga sannførandi, tí teir vunnu hvønn einasta av teimum yvir 30 dystunum, teir spældu.

Á Tvøroyri seta tey stórar vónir til hesar ungu spælararnar, tí sagt verður, at fleiri av teimum eru rættiliga evnagóðir og kunnu røkka langt við tí rætta hugburðinum, teirri røttu venjingini - og tí rætta hepninum, sum eisini skal til.

Flogbóltsstøður

Meistaradeild, kvinnur

	d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1 KÍF	4	4	-	0	12	5	7	8
2 TB	4	3	-	1	10	3	7	6
3 Mjølnir	4	2	-	2	7	6	1	4
4 Dráttur	4	1	-	3	7	10	-3	2
5 Fleyr	4	1	-	3	4	11	-7	2
6 ÍF	4	1	-	3	4	11	-7	2

Meistaradeild, menn

	d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1 Mjølnir	3	3	-	0	9	0	9	6
2 SÍ	3	2	-	1	6	3	3	4
3 Fram	2	1	-	1	3	4	-1	2
4 ÍF	1	0	-	1	0	3	-3	0
5 Fleyr	3	0	-	3	1	9	-8	0